# Billund Lufthavn – altjóða floghavnin á jútsku heiðini

**Floghavnin í Billund er eitt ár yngri enn floghavnin í Vágum og er í dag ein nútímans floghavn við einum altjóða rutukervi**

**BILLUND**
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Loftmynd av floghavnini í Billund*

Tað var fyrst í sekstiárunum, at nakrar kommunur í Miðjyllandi og Vejle Amt tóku seg saman um at byggja eina floghavn í økinum, og valið fall á Billund. Stutt eftir stovnaðu kommunurnar lutafelagið Billund Lufthavn, ið skuldi standa fyri byggingini og rakstrinum. Aftan á kommunusamanleggingina 1. januar í ár eru ognarviðurskiftini broytt eitt sindur, so nú eru tað átta kommunur, sum eiga floghavnina. Størsti einstaki eigarin er kommunan í Vejle, sum eigur ein góðan triðing av partapeninginum.

Longu í 1964 var arbeiðið at byggja floghavnina liðugt, og tann 1. november bleiv hon tikin í nýtslu. Tá var ein lendingarbreyt, sum var 1.660 metrar long og 45 metrar breið, ein lítil avgreiðslupallur og eitt eftirlitstorn við flúgvileiðaran. Terminalbygningur var eingin, men floghavnin brúkti ein hangar, sum fyritøkan LEGO átti, til hon fekk sín egna terminal í 1966.

SAS fór alt fyri eitt undir rutuflúgving millum Billund og Keypmannahavn, og longu tað fyrsta árið eydnaðist tað eisini at fáa feløg at brúka floghavnina til leiguferðir. Talan var um ta einu leiguferðina, og tað var eitt flogfar, sum fór við sjómonnum til eitt skip, sum lá í Norðuritalia.

## Vaks skjótt

Í hagtølunum hjá floghavnini sæst, at teir báðar seinastu mánaðarnar í 1964 ferðaðust 4.200 fólk um floghavnina. Av teimum komu og fóru 4.100 við flogførum í innanríkisflúgving og tey seinastu 100 við leiguflogførum.

Hesi tølini vuksu skjótt. Longu árið eftir, í 1965, kom ferðafólkatalið upp á 46.200, og av teimum flugu 3.000 á uttanríkisleiðum.

Tann veruliga flúgvingin við leiguflogførum byrjaði ikki fyrr enn í 1966. Hetta árið var talið á ferðafólki við leiguflogførum smá 9.000, árið eftir fór tað upp um 13.000, og í 1968 var tað komið heilt upp á 48.600, sum var meiri enn triðingurin av øllum, sum ferðaðust um floghavnina tað árið.

Skjótt fóru eisini tey fyrstu farmaflogførini at brúka floghavnina í Billund. Í 1966 fóru góð 1.100 tons av farmi um floghavnina, og longu fýra ár seinni, í 1970, var nøgdin meiri enn tvífaldað til smá 2.500 tons.

## Útbygd

Tey næstu árini bleiv floghavnin útbygd, so hvørt sum tørvur var á tí. Eitt nú bleiv lendingarbreytin longd fleiri ferðir, til hon í 1971 var komin út á heilar 3.100 metrar, sum hon framvegis er. Samstundis fekk hon alla nútímans lendingarútgerð.

Síðst í nítiárunum var greitt, at flo ghavnin mátti fáa ein nýggjan terminal, og hann bleiv tikin í nýtslu í mai í 2002. Terminalurin var tann største útbyggingin síðani byrjanina í sekstiárunum, og hann var liður í einari størri ætlan, sum umfataði fleiri onnur byggistig. Eitt teirra var tað nýggja parkeringshúsið, sum verður liðugt í heyst.

Tá hendan útbyggingarætlanin er liðug, verður Billund Lufthavn ein nútímans floghavn, ið lýkur øll tíðarinnar krøv. Men útbyggingin er neyðug, tí síðani tað fyrsta flogfarið setti seg í Billund fyri 43 árum síðani, er ferðafólkatalið fleirfaldað fleiri ferðir, so tað nú togar í tvær milliónir um árið. Okkurt árið hevur tað verið oman fyri tvær milliónir.

## Altjóða floghavn

Tá ES gjørdi av at liberalisera loftferðsluna, fingu flogfeløg møguleika at skipa fyri beinleiðis uttanríkisrutum til og úr Billund. Tað fyrsta felagið, sum gjørdi brúk av møguleikanum, var Maersk Air, sum fór undir beinleiðis rutuflúgving millum Billund og Southend í Onglandi. Hetta var í 1984, og síðani eru uttanríkisruturnar øktar munandi. Millum farleiðirnar eru London, Manchester, Glasgow, Amsterdam, París og sum kunnugt Føroyar.

Herfyri boðaði írska felagið Ryanair frá, at tað fer undir tvær nýggjar rutur til og úr Billund - onnur til Barcelona og hin til Milano. Herumframt eru serligar rutur til og úr Malagam Níce og Kreta.

Umleið 800 fólk starvast hjá Billund Lufthavn, men verða starvsfólkini hjá hinum feløgunum, sum virkin í floghavnini, tald við, gevur floghavnin millum 1.600 og 1.700 fólkum dagligt arbeiði.



*Puntur nummar 16 av 23*




www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari